# Blíðskapurin er óførur

**Í alt summar hava teir tríggir útvarpsmenninir Elis Poulsen, Kári Sólstein og Øssur Egholm ferðast kring landið við sendingini Summarleiðin, sum flestallir føroyingar trúfastir hava lurtað eftir. Vit vóru við teimum, tá ið sent var av Toftum herfyri**

FERÐAFRÁSØGN
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*
*Myndir: Álvur Haraldsen*

Øll kenna vit útvarpssendingina Summarleiðin, sum hevur verið í luftini seinnapartar í alt summar. Sendingin hevur verið bygd upp á tann hátt, at vitjað hevur verið í einari bygd í landinum í hvørjari sending, og so hevur sendingin snúð seg um lív og gerandisdagin í tí bygdini.

Summarleiðin hevur havt stóran áhuga millum føroyingar, og vertirnir siga eisini, at teir bara hava fingið positivar afturmeldingar frá lurtarunum.

## Fólk eru opin

Hendan mikumorgunin, ið vit vitja Summarleiðina, hitta vit teir báðar Elis Poulsen og Kára Sólstein á einari skrivstovu í útvarpshúsinum í Sortudíki, har teir sita og fyrireika dagsins sending, sum verður send av Toftum. Nakrar avtalur eru enn ikki komnar upp á pláss, og so skal tekniski parturin eisini fyrireikast saman við teknikaranum, sum hendan dagin er Suni Selfoss.

Vit hava gjørt avtalu við útvarpsmenninar um, at vit kunnu fylgja teimum, meðan sendingin er í luftini. At sendingin verður av Toftum í dag, er ikki av tilvild, tí seinni á degnum verður landsdystur millum Føroyar og Kypros á Svangaskarði.

Tað er serliga Elis, sum tekur sær av at ringja til fólk í teimum ymsu bygdunum og fáa avtalur í lag. Makkarin hjá honum, Kári Sólstein, sigur, at Elis er ein sannur meistari til at tosa við fólk, og tað stendur ongantíð á at fáa avtalurnar upp á pláss.

- Elis hevur eitt ótrúligt fólkatekki, og av tí at hann dugir so væl at tosa við fólk, ber alt til, sigur Kári Sólstein.

Sjálvur er Elis tó skjótur at skoyta uppí, at fólk eru ógvuliga opin, og nú tey kenna sendingina og stílin í henni, so smæðast tey ikki fyri at siga ja til eitt lætt prát.

## Gamalt hugskot

Hugskot um eina slíka sending sum Summarleiðina er gamalt, og tað var longu frammi, áðrenn Barometrið kom í luftina fyrstu ferð.

Elis Poulsen sigur, at málbólkurin, ið teir settu fyri Summarleiðina, var fólk úr 35 árum og eldri, men nú sending hevur verið í alt summar, kunnu teir staðfesta, at tað eru fólk í øllum aldursbólkum, ið lurta eftir sendingini.

- Vit hava fingið afturmeldingar frá fólki kring alt landið, og tað eru bæði ung og gomul, sum vit frætta frá, sigur Kári Sólstein.

- Vit eru eisini fegnir um, at við eini slíkari sending koma runt til alt landið, og tað er jú eisini málsetningurin hjá útvarpinum, at vit skulu røkka út kring alt landið, sigur Elis Poulsen.

Teir báðir siga, at teir hava lagt stóran dent á, at tónin í sendingini skal verða lættur og ikki alt ov álvarsligur, soleiðis at tað eisini verður lættari at lurta eftir.

Ein fastur táttur í sendingini er millum annað, at teir tosa við eitt umboð fyri bygdarráðið á staðnum, og vanliga er tað ikki bygdarráðsformaðurin, ið sleppur framat mikrofonini, men heldur formaðurin í tekniskunevnd ella okkurt tílíkt, greiða teir frá.

## Nýggj útgerð ger sendingina møguliga

At tað soleiðis ber til dagligani at senda beinleiðis ymsastaðnis úr landinum, er ikki minst takkað verið einum nýggjum bussi, ið útvarpið hevur ognað sær.

Hesin bussur er á tremur



*Manningin á Summarleiðini: frá vinstru Øssur Egholm, Kári Sólstein, Suni Selfoss og Elis Poulsen.*



*Elis Poulsen og Kári Sólstein fyrireika dagsins sending á skrivstovuni í Sortudíki.*



*Øssur Egholm situr við mikrofonina í nýggja bussinum hjá útvarpinum, meðan Elis og Kári eru úti í Tofta bygd.*



*Hendan dagin á Toftum er tað Suni Selfoss, ið tekur sær av teknikkinum.*



*Elis Poulsen og Hjalmar Olsen tosa um ein pappírsskurð, sum Hjalmar hevur gjørt, og sum Kári vísir fram.*